


Johan Martin Restorff:

# Pápin noyddi hann til skips

**Hesa ferð hava vit aftur ein part av Restorff søguni. Yngsti sonur gamla Restorff var Johan Martin (1853-1916). Tá í tíðini sluppu dreingir ikki at gera, sum teir vildu. Ein av teimum var Johan. Ikki fyri enn pápin var deyður, kundi hann fara at gera tað, sum hann hevði bestan hugin til**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Tann fremsta keldan til hesa søgu er William Heinesen, sum í síni tíð skrivaði áhugaverdar frásagnir um síni ættarfólk. Hetta eru frásagnir, sum ikki hava verið alment frammi, og tí er tað eitt kvett fyri hesa røð at kunna endurgeva Willliam, soleiðis sum hann sjálvur skrivaði tað niður:

### Mundi sprongt bakaríið í luftina

Medens A.W. Restorff og tildels ogsaa Frants (synir gamla Restorff) åbenbart har haft frie Hænder til at gå deres egne Veje i Spørgsmålet om Livsstilling, synes Johan at have været genstand for et ret ubilligt Tyranni fra sin Faders Side. Det er muligt, at han har været en lidt "vanskelig" Dreng. Således skal han engang have kastet et Krudthorn ned gennem sin Faders Skorsten – dog næppe i den Hensigt at sprænge Bageriet i Luften.

Skønt Johans Hu afgjort ikke stod til Sølivet, han vilde være Bager, tvang gamle Restorff igennem, at han skulde være Sømand. Efter at have stået sin Læretid igennem, og efter sigende især som Skibsdreng i 15-16 års alderen at have døjet meget ondt under brutale Befalingsmænds Hænder, tog han i København Styrmandseksamen og blev sat til at føre Frederiksvaag.

Han sejlede nu i mange Aar i Koffardi mellem Thorshavn og København. Som Kaptain bærer han Ord for at have været en pligttro Mand, men en stor Nøler. Han havde altid ondt ved at komme afsted. Men der var jo ingen Pardon, og Johan førte sit spinkle tomastede Sejlskib over det svigefulde Hav i et kvart Aarhundrede.

Først efter Faderens Død i 1896 trak han sig tilbage til den landjord, der altid havde nydt hans store Forkærlighed og giftede sig et par og Halvtreds År gammel med den 25 År yngre Lodsdatter (dóttir Christian Christiansen "Loðsurin", fyri kortum umrøddur í hesi røð) Johanne Dal-Christiansen.

For den Arv, som blev ham til Del, nedrev han sin Faders gamle hus (dog ikke ved at lempe Krudt ned gennem Skorstenen!) og opførte på Tomten en anselig moderne Bygning, hvor han drev en Slags moderne Pensionat, samtidigt med at han holdt Bageriet i Kælderen gaaende, først og fremmest med Brodersønnen Frants som Bager, siden med fremmende Bagere.

Johan, Bagerkaptajnen, som hans Ven Peter Andersen, (fyrr umrøddur í hesi røð), kaldte ham, henlevede sine sidste Aar som lykkelig og økonomisk sorgløs Ægtemand og gik gerne flegmatisk småfløjtende omkring og besøgte Venner og Bekendte. Han døde af Mæslinger (eftirsjúku) i 1916.

### Aðra staðni skrivar William um Johan:

Han blev højst ubilligt, ja oprørende behandlet. Drengen der var en sky og forsagt natur blev trods sin afgjorte utilbøjelighed for Sømandslivet simpelthen tvunget ind paa den maritime Vej og gjort til skipper for Skonnerten Frederiksvaag.

### Frederiksvaag

Frederiksvaag var ein skonnart hjá gamla Restorff, 127 t. til støddar. Hon var bygd í Dunkerque í Frankaríki í 1866. M. C Restorff keypti skipið sum vrak, tá ið hon rak á land í Havn.

Tað sigst, at fyrsta túrin Johan fór til skips, makaði veðrið, og tað gjørdist logn, táið teir komu suðurum Streymoynna. Har lógu teir og drivu í 14 dagar, uttan at koma longur.

Einaferð vórðu teir í mjørkaveðri millum lond, ásigldir av enskum trolara, sum bakkaði frá. Tá leyp ein av manningi á Frederiksvaag yvir á trolaran, og valið var tá antin at skumpa føroyingin í havið ella hjálpa teim ásigldu. Teir valdu tað seinra. Ta náttina stóða so nógv á Johan, at hann varð grásprongdur eftir eina nátt.



*SKIPARI JOHAN MARTIN RESTORFF F. 13-5 1853 D. 6-12 1916 JOHANNE FR. DAHL-RESTORFF F. 16-11 1878 D. 2-3 1964 SKJØLDUR MÍN ER HJÁ GUDI SUM FRELSIR HINI SANNHJARTAÐU SÁL. 7,11*

*Við grøvina síggjast sonarbørnini Birgit av Lofti og Johan M. Restorff*



*Johanna Fredrikka Dal-Christiansen og Johan Martin Restorff, kallaður kapteinurin*



*Christian Dahl-Restorff og konan Maria f. Joensen. Christian hevði blivið 100 ár 5.mai*

Her skal skoytast uppí um siglingina hjá Frederiksvaag, at teir í 1878 vóru fyrsta føroyska skip í Bilbao í Spanien við saltfiski. Skiparin tá var danskur. Men í 1880 vóru teir aftur, og tá var Johan Restorff skipari.

Nógvir menn fingu upplæring sum sjómenn við Frederiksvaag, sum gekk burtur í 1913.

### Gjørdist kirkjuverji

Johan gjørdist kirkjuverji við Havnar kirkju, eitt starv hann tók við eftir faðirin M.C.Restorff. Saman við Jákup Dahl, sum tá var prestur, skipaði hann fyri at fáa modellið av Norsku Løvu sent til København við Beskytteren at fáa tað riggað til av nýggjum. Hetta modell varð upprunaliga latið kirkjuni sum olmussugávu fyri teirra bjarging.

Tiskil hevur Norska Løva síðan 1917 hingið undir hválvinum á kirkjuni og verið henni eitt stórt prýði.

### Var við til at stovna Skiparafelagið

Johan var ein av teimum sum stovnaðu tað, sum í dag er Føroya Skipara- og Navigatørfelag, men sum tá kallaðist Færøernes Skipperforening.

Tann 22. desember 1895 høvdu skipaeigarar norðanfjørðs skipað fyri einum fundi at viðgera felags áhugamál. Tá var eisini tosað um sáttmálaviðurskifti. Teir vóru eisini komnir ásamt um at stovna eitt felag fyri reiðarar norðanfjørð, sum tað tó kortini ikki kom nakað burturúr.

Bert fáar dagar seinni, leygardagin 4. januar 1896, koma skipararar saman at stovna eitt felag fyri skiparar. Í fyrstu nevndina vóru valdir Anthon Jørgensen, Johan M. Restorff, Jens Mohr, Nicodemus Johannesen og Johannes Th. Hansen. Tiltaksmenn gjørdust Napoleon Andreassen og Jóhan Christiansen, í Dali

Johan Restorff gjørdist við lutakasti fyrsti formaður felagsins við. Hann hevði eitt skifti skrivstovu heima hjá sær sjálvum.

Felagið var hampuliga virkið. Tvær vikur seinni var aðalfundur hildin í felagnum. Nevndin legði fram uppskot til lógir, sum vórðu einmælt samtyktar.

Hetta var í eini tíð, tá ið stór menning var í fiskiskapinum. Felagið skuldu ikki leggja so stóran dent á sáttmálaviðurskifti. Fleiri teirra vóru eisini reiðarar. Høvuðsendamálið var at hava eitt felag til frama fyri fiskivinnu og sjóvinnu sum heild.

Johan var í fyrsta umfari formaður árini 1896-1900 og tók so við aftur í 1904-1905. Hann var nevndarlimur og varalimur fram til 1910.

Sigast kann, at grundarlagið fyri felagnum hevur verið gott. Tað livir enn og er virkið á somu økjum, sum tá tað var stovnað, nú tað er 113 ára gamalt.

### Hotellvirksemið byrjar

Johan og Johanna høvdu gistingarhúsvirksemi, kallað Private Hotel, frá 1904, har til dømis løgtingsmenn og navigatørar vóru vanir at búgva.

Eisini høvdu tey eitt størri høli, sum var rópt